# Elastikk er í tølunum

**Nýggja taltiltakið hjá Havnar Róðrarfelag opnar dyr fyri møguleikum, sum higartil hava verið fjaldir í arbeiðnum við at skriva um kappróður**



*Nýggi hagtalsgrunnurin hjá Havnar Róðrarfelag letur upp fyri nýggjum møguleikum, tá ið tað snýr seg um skriving um kappróður*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

KAPPRÓÐRAR LEKSIKON
*Jóannes Hansen*

Ólavsøkuróðurin er í morgin. Í ólavsøkublaðnum fara vit at taka fepurin í FM kappingini, sum serliga í kappingini millum 10-mannaførini stendur til at bresta.

Í hesi greinini er ætlanin at taka táttin uppaftur um róðrarhagtølini, sum Havnar Róðrarfelag í síðstu viku legði út á heimasíðu sína, drekin.fo. Hesi vórðu umrødd í síðstu viku, tá ið tikið varð burturúr tíðindaskrivinum, sum Havnar Róðrarfelag sendi til fjølmiðlarnar.

Men tiltakið er so mikið áhugavert, at tað eigur uppiborið nøkur orð frá einum, sum seinastu 10-15 árini eftir førimuni hevur roynt at gera burturúr kappróðrinum.

At tað nú ber til at sláa upp fyri at finna fram til, hvussu tíðirnar hava verið í ymsu kappingunum og á ymsu stevnunum í so mong ár er kollveltandi. Higartil hevur hetta ikki borið til. Róðrarsambandið hevur samvitskufult goymt tíðarseðlarnar frá øllum róðrunum. Men tað hevur ikki verið so stór nytta í hesum, tí tað hevur ikki borið til í eini handavend at sláa upp fyri at finna fram til, um nú talan var um met ella ikki.

Í fjør hevði Niels Dan West áhugaverdar greinar í Dimmalætting um tøl og tíðir á ymstu stevnunum. At greinarnar kendust áhugaverdar mundi komast av, at tað hevur verið so lítið av svornum tilfari.

Niels Dan West hevði sínar upplýsingar úr bløðunum. Fyri at finna fram til teir hevði hann gjørt stórt rannsóknararbeiði. Nú hevur Havnar Róðrarfelag so, um tað ber til at siga tað soleiðis, loyst trupulleikan so væl, sum tað ber til. Sum vit hava skilt tað, so eru tað Magni Brøðraberg og Gunnar Hansen, sum eru programmørar á Formula, sum hava staðið fyri arbeiðnum at tasta bestu tíðirnar í øllum bátastøddum og í øllum kappingum síðani 1974, inn, soleiðis at tað nú er rættuliga ómakaleyst at halda skil á.

Magni Brøðraberg greiðir frá, at hann hevur leingi gingið við hesum ætlanunum, og nú er tað ein stívur mánaði síðani, at teir tóku seg um reiggj fyri at fáa hetta gjørt. Nógv fólk sótu í einar tvær vikur og tastaðu inn, og úrslitið er fínt. Í staðin fyri at tosa og tosa og vera ósamd um, um tað nú var soleiðis, ella um tað nú ikki var heilt øðrvísi, so ber til beinanvegin at finna fram til røttu tíðina og rætta árið.

Øll tey, sum fáast við hagtøl í ítrótti, vita, at talan ofta er um óvissur, og at tað viðhvørt er neyðugt at fara aftur um tølini, og soleiðis hevur tað eisini verið hesa ferð. Viðhvørt hava seðlarnir hjá RSF ikki verið nóg mikið, og so hevur verið neyðugt at leita í bløðunum.

Magni nevnir sum dømi 1978, tá ið stigatølini í kappingini millum 8-mannaførini ikki passaðu við endaliga FM úrslitið. So varð neyðugt at leita, og tá varð komið fram til, at Norðoyastevnuróðurin varð tikin umaftur, og so gjørdist Kvívíkingur, sum ikki hevði tikið lut í upprunaliga róðrinum í Klaksvik, meistari.

**Elastikk er í**

Formaðurin í Róðrarsambandinum, Hannis Joensen, er sjálvandi fegin um, at tað nú ber til at fylgja betri við, enn tað higartil hevur verið møguleiki fyri. Men Hannis undirstrikar, at mettíðir í kappróðri skulu takast við øllum fyrivarnum. Hetta er nakað, sum Magni Brøðraberg eisini sigur seg vera fullgreiðan yvir.

– Útgerðina, sum vit nú brúka at máta tíðirnar við, hava vit nýtt síðani í 1991. Størsti neyvleikin er, hvussu stórur tíðarmunurin er millum fremsta bátini og so hinar, sigur Hannis Joensen. Tá ið hann skal greiða frá hugtakinum, sum vit nevna elastikk í tølunum, sigur RSF formaðurin soleiðis:

– Útgerðin er soleiðis, at tað ikki er heilt víst, at urini verða sett í gongd í júst somu løtu, tá ið startskotið ljóðar. Tað ger tað í nógv teimum flestu førunum, men tað kann koma fyri, at tað er ein lítil løta frá tí at skotið ljóðar og inntil urini verða sett í gongd.

Umframt omanfyri nevnda so vísir Hannis Joensen á tað sama, sum Magni Brøðraberg og hinir handan nýggja tiltakið hjá Havnar Róðrarfelag hava víst á.

– Tá ið fasti starturin verður nýttur, mugu vit rokna við, at bátarnir rógva sama teinin. Men tað er so stutt síðani, at fasti starturin gjørdist partur av øllum kappingunum, og tað kemur framvegis fyri, at talan er um leysan start, og tá er ikki altíð heilt víst, at talan er um sama tein. Og so eru tað serligu viðurskiftini, sum gera seg galdandi, tá ið talan er um kappróður sammett við aðrar ítróttargreinir. Her hugsi eg um veður og vind og um streym, ið hava avgerandi týdning fyri, hvussu róðrarnir og harvið tíðirnar laga seg, sigur Hannis Joensen.

Eingin ivi er í, at nýggja tiltakið hjá Havnar Róðrarfelag á heimasíðuni drekin.fo er kollveltandi, og felagið eigur allan heiður uppibornan fyri hetta kollveltandi stigið.

## Hoset á veg til FCK

FC Keypmannahavn, sum í fyrsta umfari av superliguni um vikuskiftið, spældi javnt ímóti Silkeborg, er áhugað í norska landsliðsspælaranum Magne Hoset. Sambært norska TV2 fer FCK at keypa 23 ára gamla miðvallarspælaran hjá Molde fyri 9 milliónir krónur.

– Eg komi til eitt stórfelag, og Molde fær nógvar pengar fyri meg, er tað einasta, sum Hoset vil siga.

## Brasil meistari

Tað leikaði hart á, at tað ið Brasil mánanáttina vann suðuramerikanska meistaraskapið, Copa America. Finalan var ímóti Argentina, og ikki fyrr enn í yvirtíðini av dystinum, eydnaðist tað Brasil at javna 2-1 leiðsluna hjá Argentina.

Brasilsku spælararnar fegnaðust um málið beint frammanfyri beinkinum hjá argentinarunum, og teir teittu vatn eftir teimum brasilsku spælarunum. Dómarin noyddist síðani at fáa hjálp frá løgreglumonnum fyri at fáa tamarhald á støðuni.

Finalan endaði við brotssparkskapping, sum Brasil vann.

## Armstrong vann aftur

32 ára gamli amerikumaðurin Lance Armstrong skrivaði um vikuskiftið súklusøgu, tá ið hann fyri sættu ferð á rað vann Tour de France súkklukappingina.

Eingin annar súkklari hevur nakrantíð áður megnað at vinna heimsins harðastu súklukapping seks ferðir, hóast eitt nú nøvn sum Miguel Indurain og Bernard Hinault hava vunnið kappingina fimm ferðir.

## Schumacher vinnur alt

Formel 1 koyrarin Michael Schumacher vann í gjár 11. kappingina í hesum kappingarárinum. Í gjár varð koyrt á Hockenheim-breytini í Týsklandi, og Schumacher var á odda alla tíðina. Michael Schumacher hevur einaferð áður roynt at vinna 11 kappingar sama ár, men hann hevur framvegis møguleika at betra um sítt met. Seksfaldi heimsmeistarin í Formel 1 fær ein kjans til tað í kappingini í Ungarn hálvan august.

## Bant lissur og fekk skaða

Og amerikanska tennisstjørnan, Venus Williams, fekk í gjár skaða, tá ið hon bant sær lissurnar. Venus Williams bant sær lissurnar undan einari hálvfinalu í stórari tennis-kapping í Los Angeles. Tá ið hon reistist, setti hon hondina niður í vøllin til tess at hjálpa sær upp, men av einari ella aðrari orsøk meiddi hon sær hondina av hesum.

Williams royndi tó at spæla hálvfinaluna móti landsmanninum Lindsay Davenport, men tað gjørdist tó skjótt greitt, at hon ikki var før fyri at spæla allan dystin, og so gavst hon.






**Runavíkar kommuna søkir eftir**

# Starvsfólki

**til heim fyri minnisveik fólk**

Søkt verður eftir:
- sjúkrarøktarfrøðingum
- heilsurøktarum
- heilsuhjálparum

Miðað verður eftir at heimið letur upp í september 2004.

Á heiminum er pláss fyri 8 minnisveikum fólkum. Umstøðurnar á heiminum eru góðar og væl egnaðar til fólk ið eru minnisveik. Harumframt liggur heimið í vøkrum náttúrulendi beint við Toftavatn.

Endamálið við heiminum er at geva minnisveikum fólki, við serligum tørvi á umsorgan, eina trygga og stimbrandi tilveru. Vit ynskja starvsfólk sum hevur áhuga og hegni til at vera um minnisveik fólk. Dentur verður lagdur á góðan moral, etisk virði, positiva menniskjaáskoðan og góð samstarvsevni.

**Krøv til umsøkjarnar:**
- hevur prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur, almanna- og heilsuatstøðingur ella heilsuhjálpari
- hevur áhuga fyri røkt av minnisveikum fólkum
- hevur hug og hegni at vera um minnisveik fólk
- hevur góð samstarvsevnir
- hevur gott yvirlit og megnar at skipa dagin eftir tørvinum hjá búfólkinum
- er nýhugsandi og hevur hug og árræði at skipa fyri dagligum virksemi fyri tey minnisveiku

**Vit kunnu bjóða**
- Eitt starvsumhvørvi, har tú kanst gera tína áskoðan galdandi og verða við til at
- menna umsorgan og røkt
- Góða innleiðslu
- Undirvísing
- Góðar møguleikar til at brúka tíni skapandi og ígongdsetandi evni

**Eisini verður søkt eftir**
- fólki til køkin
- fólki til reingerð

Um ikki nóg nógvir skikkaðir umsøkjarar søkja, verða hjálparfólk sett.

**Setanartreytir**
Løn og setanartreytir smb. sáttmála millum viðkomandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið ella Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

Nærri fæst at vita um størvini við at tosa við Maibritt Jacobsen, leiðara á tlf. 448034 ella 509534

Umsókn við avriti av prógvi v.m. skal sendast til:
**Runavíkar Kommuna**
Att. Jákup H. Foldbo, sosialdeildarleiðari
Heiðavegur 26, Postboks 139
FO-600 Saltangará

**Umsóknarfreist:** Mánadagin 9. august 2004 kl. 12.00

# Stuðulsfólk

Almannastovan søkir við hesum eftir stuðulsfólki.

Sum stuðul fært tú eitt sjálvstøðugt og fjølbroytt starv.

- Arbeiðið fevnir m.a. um:
- Fylgjarauppgávur
- Stimbran
- Umlætting

Størvini eru hesi:

**Tórshavn**

**1)** – at stuðla og hjálpa eini 13 ára gamlari gentu og fara við henni til ymisk frítíðartiltøk. Arbeiðið hjá stuðlinum verður eftir skúlatíð hjá gentuni seinnapartar og kvøld og fer arbeiði m.a. fram í Bridghúsinum, ið er eitt tilhaldsstað fyri stuðulsfólk og børn. Tímatalið er **20 tímar um vikuna**, játtanin er fyribils galdandi til 31.12.04

**2)** - at stuðla og hjálpa eini 12 ára gamlari gentu og fara við henni til ymisk frítíðartiltøk.
Arbeiðið hjá stuðlinum verður aftaná skúlatíð hjá gentuni og fer arbeiði m.a. fram í Bridghúsinum, ið er eitt tilhaldsstað fyri stuðulsfólk og børn.
Tímatalið er **25 tímar um vikuna**, játtanin er fyribils galdandi til 31.12.04

**Eysturoy**

**3)** - at stuðla og hjálpa einum 8 ára gomlum drongi í samskiftinum við onnur børn, stimbra honum við venjingum og spæli, einsamøllum og saman við øðrum.
Arbeiðið hjá stuðlinum verður aftaná skúlatíð hjá dronginum, í Frítíðaransingini á Skála.
**Fyrimunur er, um umsøkjarin dugir ella kennir til Tekn til Talu**
Tímatalið er **25 tímar um vikuna**, játtanin er fyribils galdandi til 31.12.04

**Norðoyggjar**

**4)** - at stuðla, hjálpa og fara við eini 15 ára gamlari gentu til ymisk frítíðartiltøk.
Arbeiðstíðin er skiftandi dag-kvøld og okkurt vikuskifti.
Tímatalið er **12 tímar um vikuna**, játtanin er fyribils galdandi til 31.12.04

Setunarviðurskiftini eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og avvarðandi yrkisfelag í mun til uppgávuna.

Nærri fæst at vita við at venda sær til Brekdeildina á tlf.nr. 35 35 10, gerandisdagar millum klokkan 10.00 og 13.00.

Umsóknir saman við upplýsingum um útbúgving, royndir og møguligum viðmælum, skulu verða **Almannastovuni, J. Broncksgøta 27, Postboks 3096, 110 Tórshavn**, í hendi í seinasta lagi 11.08.04

**Í umsókníni skal vera tilskilað uppgávunummar.**

# Jørð í Porkeri til sølu

4 gyllin 10 skinn, heimari partur, matr. 242. Innangarðs vídd 4696 fermetrar.

Eitt traðarstykki, matr. 211, vídd 8529 fermetrar.

Verður selt, um hóskandi boð fæst.

**Tlf. 211278**




# Skálavíkar skúli

Hetta starv er leyst at søkja fyri skúlaárið 2004/05.

1 lærarastarv vegna avlopstímar 9 t/v.

Starvið, ið er tíðaravmarkað skúlaárið 2004/05, verður lønt sambart sáttmála millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmáláráðið.

Umsóknirnar skulu verða skúlastýrinum í hendi í seinasta lagi 3. august.

**Skálavíkar skúlastýri**
v/ Signhild Jacobsen
FO-220 Skálavík
Tlf. 361996/507362

# Runavíkar Skúlanevnd

Søkt verður eftir lærara til at undirvísa 12 tímar um vikuna alt skúlaárið 2004/2005.

Talan er um avlopstímar, og í tímatalvuni eru 12 tímar við dreingjaítrótti.

Starvið er lønt samb. sáttmála ímillum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmáláráðið.

Møguligar umsóknir skulu vera skúlanevndini í hendi í seinasta lagi 1. agusut 2004.

Fleiri upplýsingar kunnu fáast við at ringja 447956/217331 ella 449975.

**f. Runavíkar Skúlanevnd**
Malan Rasmussen, tlf. 441842
Niðari Vegur · FO-660 Søldarfjørður